Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Føroya Landsbókasavn 175 ár:

# Kanska hendingarríkastu árini í søgu Landsbókasavnsins



Durita Joensen, settur landsbókavørður, beyð vælkomin í 175 ára føðingardag

Mynd: Jens Kristian Vang



Tríggir vetaranar innan bókmentir, f.v. Rólant Lenvig, Johannes Andreas Næs og Petur Jacob Sigvardsen

Mynd: Jens Kristian Vang

**Mikudagin 5. november fylti Føroya Landsbókasavn 175 ár. Í hesum sambandi var móttøka á stovninum í J.C. Svabosgøtu hendan dagin. Durita Joensen, settur landsbókavørður, beyð vælkomin og**

**Malan Marnersdóttir, rektari á Fróðskaparsetri Føroya, segði eisini nøkur orð**

Tað eru ikki nógvir stovnar sum kunnu halda 175 ára føðingardag. Men tað kundi Landsbókasavnið 5. november 2003.

Durita Joensen, settur landsbókavørður, meðan Martin Næs er í farloyvi, segði í síni røðu m.a. at eitt tíggju ára skeið er kanska ikki so langt, tá man verður 175 ár, men hesi seinastu tíggju árini, síðan Landsbókasavnið helt sín 165 ára føðingardag, vóru kanska nøkur av teimum mest hendingarríku í søguni hjá stovninum.

Stórar broytingar eru farnar fram, sum bæði vit sum arbeiða á bókasøvnunum og lánarar hava merkt. Vit eru farin so at siga "world wide" . Við bókasavnslógini frá 2002 er bókin, frá at vera nærum einaráðandi, vorðin til at verða bara ein av mongum miðlum, sum eiga innivist á einum bókasavni, segði Durita Joensen. Hon helt tað vera áhugavert at kunna staðfesta at hóast allar hesar broytingar, var grundhugsjónin hjá Færø Amts Bibliothek í 1828 og hjá Føroya Landsbókasavni í dag tann sama: Bókasavnið er fyri øll og ókeypis.

Færøernes Amtsbibliothek bleiv stovnað 5. november 1828 og í oktober 1829 stóðu nýggju bókasavnshúsini í Quillingsgarði liðug. Fyrsti bókavørðurin var Jens Davidsen, sum doyði í 1878.

Í 1920 var útlánið hjá bókasavninum flutt í Fútahúsini úti á Reyni, meðan lesistovan framvegis varð í Quillingsgarði. Í 1931 varð flutt inn í nýggju bókasavnshúsini á Debesartrøð. Húsini vóru 228 fermetrar og kostaðu 80.000 krónur.

24. september 1980 vórðu nýggju bókasavnshúsini í J.C. Svabosgøtu tikin í nýtslu. Gólvvíddin er 1800 fermetrar og tey kostaðu 8,6 mió.

Á Landsbókasavninum er ein áhugaverd framsýning sett upp í sambandi við føðingardagin, sum vísr alla søguna hjá stovninum.



Her eru millum onnur Erhard Jacobsen,bókavørður á Landsbókasavninum, og Símun Arge fornfrøðingur

Mynd: Jens Kristian Vang



Malan Marnersdóttir, rektari á Fróðskaparsetri Føroya, helt eisini røðu

Mynd: Jens Kristian Vang



Nógv fólk vitjaðu Landsbókasavnið á føðingardegnum, f.v. Andras Mortensen, Jóhan Hendrik Winther Poulsen og Hanus Samuelsen

Mynd: Jens Kristian Vang



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Aksal Poulsen:

## 25 ára starvsdag hjá Postverki Føroya



Hósdagin 6. november hevði Aksal Poulsen í Sumba starvast 25 ár á Frímerkjadeildini hjá Postverki Føroya.

Aksal er sumbingur, foreldrini vóru, Elvira, f. Magnussen, og Poul Midjord Poulsen, bæði úr Sumba. Elvira passaði hús og heim, meðan Poul var sjómaður.

Aksal var sjómaður og sigldi við fiskiskipi í mong ár. Í 1975 og 76 sigldi hann við Smyrli hjá Strandferðsluni, síðan koyrdi hann lastbil hjá sildaverksmiðjuni í Lopra, til hann kom til Havnar og fekk starv á Frímerkjadeildini, har hann bleiv settur í fast starv 6. november 1978. Í 1988 flutti Aksal aftur til Sumbiar, har hann hevur arbeitt fyri Frímerkjadeildina og ger tað framvegis.

Aksal er ógvuliiga áhugaður í fulglalívi og tað munnu vera fá, sum hava størri savn av fuglum enn hann. Summir fuglar eru rættiliga sjáldsamir. Hann var eisini tann sum tók stig til at stova Føroya Fuglafrøðifelag og er ein av oddamonnunum í felagnum. Aksal veit so nógv um fuglar sum fáur. Hann hevur eisini eitt stórt savn av summarfuglum og veit rættiliga nógv um føroyskar steinar. Eisini hevur hann stóran áhuga fyri seyði.

Aksal er giftur við Beintu, f. Hjelm, úr Vági. Foreldini hjá henni vóru Lissy, f. Tausen, og Henning Hjelm í Vági. Lissy var fyristøðukvinna fyri heimahjálpini í sunnaru helvt í Suðuroy, og Henning hevði reinsaríið á Fossi í Vági.

Beinta og Aksal eiga dóttirna Gunnvá, 25 ár, og sonin Poul, 17 ár.

## Fimm ættarlið



Tann 17. oktober fingu Fía Lindenskov og Steingrímur Funding í Havn ein son. Her er hann avmyndaður í fanginum á oldurabbanum, Jóhannus Jacobsen í Fuglafirði, vanliga nevndur Skómakarin. Frá vinstru síggjast Jóna Lindenskov, langomma, Fía Lindenskov, mamma, Jóhannus, oldurabbin, við tí lítla og Elin Lindenskov, sum er omman. Umframt at vera oldurabbi hjá hesum lítla, er Jóhannus eisini oldurabbabeiggi, tí bróðir hansara, Jákup Sigurð, var langabbi Steingrím.



## Charlotta á Váli Olsen á ting

5. november tók Charlotta á Váli sæti á tingi fyri Jenis av Rana, løgtingsmann, sum er í farloyvi. Charlotta varð næst á lista Miðfloksins í Suðurstreymoyar valdømi.

Samtykt varð uttan atkvøðugreiðslu, at Charlotta á Váli Olsen, ið áður hevur verið á tingi, tók sæti á tingi fyri Jenis av Rana.

Heðin Joensen:

## Nýggjur deildarstjóri hjá Smyril Line



Smyril Line hevur frá 4. november 2003 sett Heðin Joensen sum deildarstjóra fyri øllum farmavirksemi felagsins.

Heðin er 38 ára gamal og hevur síðani 1999 starvast sum sølu- og marknaðarleiðari á farmadeildini hjá Smyril Line, áðrenn tað var hann frá 1996-99 sølu- og marknaðarleiðari hjá Eimskip.

Frá 1983-1996 starvaðist Heðin hjá Føroya Fiskasølu, haðani hann varð útlærdur í "Shipping" og "Transport". Í tíðarskeiðnum hjá Fiskasøluni var hann eisini nøkur ár uttanlands.

VARPIÐ
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá • TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

### Dagurin

**7. november. Engelbrekt,** deyður í 1225. Týskur munkur, sum longu 30 ára gamal gjørdist erkabiskupur í Köln. Sum kirkjupolitikari tók hann sær fyri at bøta um mong viðurskifti, sum vóru farin av lagi. Fekk, sum vera man, nógvar fíggindar, sum gingu saman í ráð og myrdu hann.

Navnið er týskt, av fólkaslagnum *anglar* saman við orðinum *bjartur*.